


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Uttanumtosið



ANNA BRATTABERG SAMUELSEN
Tjóðveldi

"Nú royna Tjóðveldið og Sambandið at øsa alt upp í skúm," segði Bill Justinussen herfyri, tá ið sjónvarpið spurdi hann, um Miðflokkurin var ein loysingarflokkur ella ein sambandsflokkur. "Uttanumtos" kallaðu Frændur slíkt tos í einum sangi. – Uttanumtos, har man letur vera við at siga, hvat man egentliga meinar við ymisk evni, ið upptaka fólk. Tað sigst enntá at vera uttanumtosið, ið avgerð, um ein politikari heldur leingi, ella ikki. Tí dugir hann nóg væl at tosa uttanum, so kann hann ongantíð fangast á skeiva beininum. Hann gerst hálur og klárar at snúgva sær undan øllum vanda. Hann klárar at tekkjast so mikið nógvum fólki, at hann verður valdur aftur og aftur, tí hann lovar at arbeiða fyri hesum evninum og eisini hasum evninum og allarhelst onkrum triðja við, hóast tey saktans kunnu vera í andsøgn til hvørt annað. – Og verður hann so spurdur um, hvat hann egentliga meinar, so kemur tað aftur: Uttanumtosið!

Tá ið Miðflokkurin tosar uttanum viðvíkjandi spurninginum Loysing ella Samband, so gera teir tað fyri at raka breitt. Tað følist viðhvørt, sum um politikarar skjóta við spjaði-høglum inn í staraflokkin, tí vónandi rakar teir nóg nógvar við tí, til at fáa eitt ordans kók. – Vit hava alt ov leingi sligið okkum til tols við hesum uttanumtosi. Í mentanartíðindunum í sjónvarpinum fríggjakvøldið var evnið mentan og politikkur. Spurningurin varð, um mentanin hevði fingið ta umrøðu, hon hevur uppiborið í valstríðnum. Sagt varð, at tey einastu, sum veruliga hava tosað um mentan, eru tey, sum vilja skerja ella temja mentarlívið. Samfelagsfrøðingurin Jóannes N. Dalsgaard, segði tá so rámandi, at "Politikkur snýr seg um dagsskráir!" – Tann, sum fær sítt mál á dagsskrá, hevur í roynd og veru vunnið ein avgerandi politiskan sigur.

Og tí hava Tjóðveldið og Sambandið valt at fara undir hesar fundir, har stóri spurningurin Loysing ella Samband verður tikin upp til umrøðu. Tí við honum er einki uttanumtos. Antin er man fyri, ella er man ímóti. Tað er nemliga trongdin at klára seg sjálvan, at standa á egnum beinum, ið hevur skapt allan framburð í Føroyum. Longu miðskeiðis í 19. øld – fyri hálvt annað hundrað árum síðan! – var tað trongdin at klára seg sjálvi, at standa á egnum beinum, ið gjørdi, at menn sum Mads Winter arbeiddu fyri at fáa endurreist løgtingið, at fáa avtikið einahandilin – og tað eydnaðist!

Tað var hendan trongdin, ið gjørdi, at vit føroyingar valdu at byggja okkara land út. Hendan trongdin var sterk her í Suðuroynni, og tað er júst tí, at vit vóru fyrsta oyggj við vegasambandi millum allar bygdir. Tað var tí, vit fingu tveir stórar og sterkar vinnudeplar í oynni. Á Tvøroyri og í Vági! – Og nú Hovstunnilin er komin, átti at verið lagamanni, at vent negativu gongdini í okkara oyggj. Tí tað kann ikki passa, at suðringar ikki eiga trongdina at klára seg sjálvar, at standa á egnum beinum longur! Ella eru vit so heilavaskaði av propagandaini, at vit einki orka, einki duga, at vit nú veruliga einki orka ella duga? NEI! So bestemt ikki!

Vit føroyingar líða bara undir, at vit hava alt ov nógvar politikarar, sum duga sera væl ta kynstrið at tosa uttanum. Fyri hálvum fjórða ári síðan, tá ið Jóannes Ejdesgaard hevði verið løgmaður í eitt hálvt ár, segði hann, at nú var stættarstríðið av. – Kampurin var vunnin! – og stutt eftir proklameraði hann, at nú var loysingarspurningurin loystur! – Men hóast hann við hesum helt seg seta dagsskránna, so hevur eftirtíðin víst, at hann so dyggiliga fór skeivur! – Stættarstríðið av? – Er ikki gjógvin millum samfelagsbólkarnar alsamt vaksandi? Gerst tað ikki alsamt truplari hjá gomlum og veikum at klára seg í føroyska samfelagnum í dag?

Og loysingarspurningurin? – Kongeriget Danmark forså vidt angår Færøerne! – er tað ein loysn? Tað vísir seg ið hvussu er á ítróttarliga pallinum, á mentanarliga økinum og í útbúgvingarhøpi, beinleiðis at vera eitt haft um beinini! – Og allarhelst er tað eisini so á vinnuøkinum, tí tað er hóast alt betur at vera harri í egnum húsi, tá ið man skal út at samstarva við onnur! – Tað er ikki so lætt at síggjast, um man altíð krógvar seg í skjúrtufaldinum hjá onkrum øðrum!

Minnast tit optimismuna? Optimismuna, sum var galdandi, tá ið landsstýrið arbeiddi við einum greiðum máli – Tá ið landsstýrið arbeiddi fram ímóti loysingini! – tað var næstan ikki mark fyri tí arbeiðssemi og virkisfýsni fólk høvdu. Hevði man okkurt gott hugskot til onkra verkætlan, so fór man í gongd! – Vit vilja hava optimismuna aftur! Optimismuna, sum kemur í, tá ið fólk seta sær fyri at gera tað, tey trúgva uppá, tí tey vilja! – Eitt er at fyrihalda seg til veruleikan, sum hann er, nakað heilt annað er at taka seg um reiggj at royna at broyta korini, sum man ikki er nøgdur við. Og seinastu fýra árini hava víst, at man ikki kemur nakran veg við bert at siga, at man hevur eina visión. Nei, tað má kjøt uppá visiónina. Man má vita, hvat tað er man ætlar sær!

Og tað vita vit í Tjóðveldinum! – Har ið merkini veittra veittri eisini mítt! sum Hans Andrias Djurhuus segði í flaggsanginum! – Vit vilja nemliga hava einar frælsar og fríar Føroyar. Einar Føroyar, har trongdin at klára seg sjálvan, at standa á egnum beinum, er tað, sum drívur verkið! Og tað er einki uttanumtos!

Vel meg – set X við lista E, tað er nakað, anna

# Brúka vit og skil



ANYA MIDJORD
Fólkaflokkurin

Vælútbúgvið skúlaverk
Øll eru vit samd um, at skúlaverkið skal betrast. Og her hugsi eg ikki bara um fólkaskúlan, men eisini um miðnámsskúlar og hægri lærustovnar. Stóra avbjóðingin er, hvussu vit skulu arbeiða víðari. Eg haldi, at vit mugu gera eina heildarætlan fyri alt okkara skúlaverk og seta okkum greið mál fyri, hvussu og nær vit røkka málunum.

**Reint umhvørvið**
Føroyar skulu vera við í altjóða samfelagnum. Tí haldi eg, at vit føroyingar eiga at hava dirvi at seta okkum sjálvum krøv um minni $CO_2$ útlát og at seta tiltøk í verk at fyribyrgja dálking. Hetta vinna vit inn aftur fleiri ferðir upp á longri sikt.

**Sjálvstýri**
Vit eiga miðvíst at arbeiða við at yvirtaka mál, ið danir ráða yvir. Soleiðis fara føroyingar at ráða á øllum økjum, og soleiðis kunnu vit øll umboða Føroyar úti í heimi.

Heilsugott heilsuverk
Heilsuverkið skal betrast, so vit kunnu viðgera fleiri sjúklingar her heima. Ikki skal vera neyðugt framhaldandi at senda so nógvar sjúklingar av landinum til viðgerðar.

Sjálvberandi búskap
Í øllum okkara vallyftum mugu vit ikki gloyma, at vit skulu hava ein sjálvberandi búskap. Vanligt vit og skil, har vit tryggja, at vit fáa meira inn, enn vit koyra út aftur.

Klipt úr útbúgvingum
Eg eri vís í, at vit mugu seta inn á fleiri økjum - so sum: At menna og betra lærarаútbúgvingar, at betra fysisku skúlakarmarnar bæði hjá lærarum og næmingum, at betra og økja samstarvið millum skúlar, herí eisini at gera tað møguligt hjá fleiri skúlum at brúka somu ella deilast um ressursirnar. Við øðrum orðum mugu vit Skúlagongdin er grundarsteinurin og barlastin í okkara samfelag, har fólkaskúlin er

**Klipt úr umhvørvi**
Vit erpa okkum mangan av reina havumhvøvið okkara, men hvat gera vit í veruleikanum fyri at varðveita tað? Og er tað nóg mikið at havið kring okkum er lutfalsliga reint, tá heimurin leggur stóran dent á, at alt umhvørvið skal haldast reint

# 4 ár og so… - ella einki ?



JOEN PETER PETERSEN
Sambandsflokkurin

Í morgin skulu tit til at velja tykkum nýggja landsins leiðslu, við einari nýggjari valskipan og einum valdømi, fyri eitt 4 ára valskeið.

Hvønn skulu tit velja?

Ja, tað er tygara val, men eg vil heita á tygum um at stuðla mær, tí at eg vil arbeiða fyri at okkara fiskimenn fáa eina betri pensjón, enn teir hava í dag: Hon er láturlig!

Vil tú hava, at ein sjómaður skal hava betri pensjón, ja, so fer tú á val í morgin og setir tín kross fyri meg.

Vælferðin skal fíggjast gjøgnum skilagóða búskaparstýring.

Sterkur og størri búskapur gevur pláss til meira vælferð.

Ein havgranskingarstovnur skal setast á stovn í Føroyum. Slíkur stovnur er natúrligur í einum landi sum liggur, har Føroyar liggja í Norðuratlantshavinum, og livir av fiskivinnu.

Eg meini, at vit skula stuðla ítróttinum meira. Sum tann stóra reklaman úti í heimi, sum ítrótturin er, meini eg, at vit skula seta ítróttin á fíggjarlógina.

Ítróttaháskúli skal setast á stovn.

Sit ikki heima, men far á val og ger tína borgaliga skyldu.

X við
Joen Peter Petersen
Valevnið
Sambandsflokksins

# Góðu veljarar!



NITA NÆS
Javnaðaflokkurin

So er valstríðið av á hesum sinni.
Hart og heitt, men av og á eisini feitt.
Nógv er sagt og skrivað, og ert tú í iva,
hvønn tú skalt velja far so inn á *www.j.fo*
Vælferð er bert vælferð, um hon røkkur heilt út til tey - sum hava brúk fyri henni.
Við javnaðarakvøðu